Fróðskaparsetur Føroya

3. oktober 2007

**Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 7/2007**

Tíð: Mikudagin 3. oktober 2007, kl. 9-11.45.
Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Elin Súsanna Jacobsen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 6/2007 setursráðsfundi 7. september 2007.**
Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarstøðan.** (J.nr. (3) 10-12-20070002).
   **a.** Setursskrivarin kunnaði um uppskotið til FL 08, sum er lagt fyri Løgtingið. Uppskotið sær út til at vera 3.152 mió kr. hægri enn í 2007. Her er tó ein villa í talinum fyri 2007, eykajáttanin upp á 350 tkr er ikki tikin við. Hækkanin er tí 2.802 mió kr. Av hesum eru 1.8 mió kr. oyramerktar til útbúgving í KT og løgfrøði. Restin skal sambært fíggjarlógartekstinum nýtast til at uppstiga starvsfólk á Læraraskúlanum og Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum.
   Setursskrivarin gjørdi vart við at tørvur er á umleið 350 tkr. afturat til hølini í Jónas Broncks gøtu, tá er húsaleiga, vask, el og olja roknað við mótroknað útreiðslunum, sum eru spardar við uppsøgdu avtaluni á Vinnuháskúlanum. Eisini má roknast við lønarhækkingum, umleið 300 tkr. Avlopið til uppstiging er tí einans umleið 350 tkr.
   Einki er sett av til nýggju leiðsluna av samanløgdu stovnunum, her er í lógararbeiðinum gjørt vart við, at neyðugt er at seta løn av til rektara, dekanar, lestrarvegleiðara og styrkta fyrisiting. Eisini skal samsýning rindast stýrislimunum. Játtanaruppskotið til hinar báðar stovnarnar í samanleggingarætlanini er eftir okkara upplýsingum eisini ov lítil. Samanlagt metti setursskrivarin, at tað fíggjarliga als ikki er tikin hædd fyri

samanleggingini, og at vandi er fyri at neyðugt verður at taka pening frá undirvísing og gransking, um fíggjarlógin og uppskotið til lóg fyri Føroya Lærda Háskúla verða samtykt í verandi líki. Setursráðið gjørd vart við, at játtanin sum er ikki strekkir til tað virksemi, sum stovnurin hevur í ár og at tað átti at verið økt um játtanina til verandi virksemi, heldur enn at taka av henni. Rektarin vendir sær alt fyri eitt til Mentamáláráðið og Fíggjarnevndina við kunning um okkara metingar.

**b.** Fíggjarstøðan 2007 varð eisini umrødd. Arbeitt verður við at gera eitt nýtt býti, tað er tó greitt, at tað allarhelst verður eitt yvirtrekk á játtanini, serliga orsakað av neyðugu íløgunum í sambandi við flytingina til Jónas Broncks gøtu. Setursráðið verður kunnað um fíggjarstøðuna sum skjótast.

**4.** **Lógaruppskot til hoyringar um nýggja lóg og nýggjan bygnað á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. (3) 10-00-20070002). Viðmerkingar eru komnar frá Føroyamálsdeildini og Náttúruvísindadeildini, umframt frá studentum og ymsum øðrum pørtum. Fleiri fundir hava verið um málið. Semja um, at setursskrivarin skrivar útkast til hoyringssvar og sendir setursráðnum hetta til støðutakan. Støði skal takast í viðmerkingunum frá deildunum. Viðmerkingar frá norðurlendskum málfrøðingum skulu leggjast við sum sjálvstøðug skjøl. Neyðugt er at gera greitt vart við manglandi samanhangin millum fíggjarlógaruppskotið 2008 og uppskotið um samanlegging. Setursráðið fer á hoyringsfundin, sum er fluttur til mikudagin 10. oktober.

**5.** **Umsókn frá Anniku Sølvará um farloyvi úr setursskrivarastarvinum í 1 ár frá 1.12.07 at rokna.** (J.nr. (3) 10-22.01-20070001). *Annika fór av fundinum, meðan hetta málið varð viðgjørt.* Setursráðið samtykti at ganga umsóknini um farloyvi á møti. Gjørt varð av at søkja eftir avloysara sum skjótast. Skotið varð upp at kanna, um til ber at skipa starvið sum tíðaravmarkað projektstarv í sambandi við komandi samanleggingarnar. Setursskrivstovan kannar málið og ger saman við rektaranum uppskot til starvslýsing.

**6.** **Nýggjar útbúgvingar á Náttúruvísindadeildini.** (J.nr. (3) 10-40-20070005). *Fundarskjal: Skriv frá Náttúruvísindadeildini, dagfest 2. oktober 2007.* Hans Pauli Joensen greiddi frá. Samlaði fíggjartørvurin til nýggju útbúgvingarnar er munandi hægri enn játtanaruppskotið fyri 2008 rúmar. Setursráðið tók undir við ætlanunum um nýggjar útbúgvingar á Náttúruvísindadeildini. Kunnandi fundurin, sum var avtalaður við Mentamálaráðið, er útsettur, men verður væntandi í næstum.

**7.** **Setan av vísindaligum avloysara á Søgu- og Samfelagsdeildini.** Setursráðið staðfesti tilmælið frá Søgu- og Samfelagsdeildini um at seta Beintu í Jákupsstovu í starv sum lektari í stjórnmálafrøði, 20% starv frá 1. september 2007, síðani fult starv frá 1. januar til 31. desember 2008. Setursskrivstovan avgreiðir málið.

**8.** **Kunning frá deildunum o.ø.:**

**a.** **Skrivarafundir 17.9.07 og 1.10.07.** (J.nr. (3) 10-05-20070007). Einki at leggja afturat.

b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 25.9.07.** (J.nr. (3) 10-01-20070003). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

9. **Valnevndin hevur útskrivað val til megindeildarráðini. Valdagurin verður fríggjadagin 5. oktober 2007. Valt verður á Setursskrivstovuni millum kl. 10.00-15.00. Valnevndin skipar fyri rektaravali, tá megindeildarráðsvalið er avgreitt. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-01-20070012).
Staðfest.

10. **Próvdómaragóðkenning. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini er Mentamálaráðið biðið um góðkenning av Dattatray S. Parasnis, Ph.D., pens. professara, seinast í starvi á Universitetet i Luleå, búsitandi í Luleå, Svøríki, *Innan Kolvetnisverkfrøði.* At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-25-20070001).
Staðfest.

11. **Leingjan av setanini hjá Andrasi Mortensen sum adjungeraður lektari á Søgu- og Samfelagsdeildini, galdandi 1.8.07 – 31.7.10. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-22.02.20070006).
Staðfest.

**Kunningarmál:**

12. **Mánaðarjavni ultimo august 2007, nýtsla fyri alt setrið 11.594.600 kr = 58,7% av játtanarkarmi uppá 19.749.000 kr.** (J.nr. (3) 10-12-20070002).

13. **Grein hjá Russell Fielding í The Explorers Journal "Whale Hunting in the Faroe Islands. Russell fekk námsferðarstuðul í 2005.** (J.nr. 0071-01392).

14. **Seminar "Developing Joint Programmes and Degrees in the Nordic and Baltic Countries" 13.-14.12.07 í Tampere, Finnlandi. Fyriskipari er Nordlys undir Norðurlendska Ráðharraráðnum.**

15. **Útgávur:**
    a. **Livikorini hjá fyritíðarpensjónistum í Føroyum – ein spurnakanning, Olga Biskopstø og Martha Mýri, Granskingardepilin fyri Økismenning og MBF, Arbeiðsrit nr. 16/2007.** (J.nr. (3) 10-69-20070002).
    b. **Sjóvarmál, Fiskirannsóknarstovan 2007.**
    c. **Åbo Akademi University, Publications 2007.**

Frágreiðing: Annika Sølvará